## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Lot til andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk av útsynningi og regn ella mjørki. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og fyrrapartin yvirhøvur turt, men seinnapartin ælingur. Hitin millum 6 og 9 stig.




Veðrið fríggjadagin:
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av vestri og útnyrðingi og ælingur, partvís vátakavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin upp í hvassan vind av útsynningi og vestri. Sunnudagin hækkar hann upp í útnyrðing. Ælingur, sum fráliður kavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 1 og 5 stig.

# Bindiklubbi hátíðarhelt 40 ára dag

**Ein 40 ára gamal bindiklubbi í Vági beyð mikukvøldið 25. januar øllum áhugaðum bindiklubbum til samkomu og eini 12-13 bindiklubbar savnaðust í Jómsborg til hesa hugnaløtuna**

**BINDIKLUBBAR**
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Í Vági hava nakrar bindiglaðar dámur savnast í bindiklubba í 40 ár. Ikki mangir bindiklubbar gerast so gamlir, so tær hildu, at stuttligt hevði verið at hildið dagin á onkran hátt.

Tær gjørdu av at hongja plakat upp, har tær bjóðaðu øllum bindiklubbum í bygdini til hugnakvøld í Jómsborg.

Úrslitið var, at eini 12 – 13 bindiklubbar hittust mikukvøldið 25. januar.

**Bundu ikki frið**

Torgerð Suðuroy var borðstjóri og onkur hevði guitara við. Og hóast friðaligt var inni, tá Sosialurin vitjaðu innar til myndatøku, so bundu tær ikki frið hetta kvøld, og tað sigst, at seinni á kvøldinum var sum í rytubergi.

Og kvinnurnar høvdu enntá ikki fyri neyðini at hugsa um kaffi og køkur, tí hesum tóku menninir hjá nøkrum teirra, ið bjóðað høvdu, sær av. Á matarskránni var m.a. ein óføra fín køka, har eitt plagg og stokkar vóru á og har áksriftin var 40 ár.

Miðvikukvøld var, so hugnaløtan endaði í sámuligari tíð, men stak hugnaligt sigst hava verið.

Fleiri myndir síggjat á portal.fo undir myndatema.



*40 ára gamli bindiklubbin avmyndaður saman við borðstjóranum hetta hugnakvøld*




*Flott bindiklubbakøka*



*Mennirnir stóðu í køkinum og syrgdu fyri, at ongin manglaði nakað*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -4 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | -- |
| Ammassalik | -- |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | -- |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 8 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 5 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -4 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | -14 |
| Moskva | -10 |
| Berlin | 4 |
| Warzawa | -1 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 4 |
| Paris | 5 |
| Madrid | 4 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 12 |
| Athen | 12 |
| Malta | 14 |
| Tunis | 14 |
| Beijing | 7 |
| New Dehli | 23 |
| Bangkok | 27 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | -- |
| New York | 4 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 7 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 27 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 974 hPa. við Jan Mayen stendur mestsum í stað og kuldabrúgvin við Føroyar fer eystureftir.Eitt annað lágtrýst, 996 hPa, í landsynning úr Hvarvinum verður við Føroyar mikunáttina.




**Í dag:**
Lágtrýstið við Hvarvið fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani fer um Føroyar mikukvøldið

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 28/1 kl. 06⁰⁰– 29/1. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,6°
Minsti hiti máldur í januar: -10° - Mesti hiti máldur í januar: 3,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 55,0 mm – mált frá 28/1 kl. $06^{00}$– 29/1 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í januar: 144,0 mm










| | |
|---|---|
| 22. januar | Mánin næstur jørðini |
| 25. januar | Fyrra kvarter |
| 2. februar | Fullmáni |
| 7. februar | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 30. Jan | 04.14 | 16.41 | 03.14 | 15.41 | 03.29 | 15.56 | 06.14 | 18.41 | 07.14 | 19.41 | 02.29 | 14.56 | 01.29 | 13.56 | 04.29 | 16.56 | 05.29 | 17.56 | 03.59 | 16.26 | 05.14 | 17.41 |
| 31. Jan | 05.09 | 17.35 | 04.09 | 16.35 | 04.24 | 16.50 | 07.09 | 19.35 | 08.09 | 20.35 | 03.24 | 15.50 | 02.24 | 14.50 | 05.24 | 17.50 | 06.24 | 18.50 | 04.54 | 17.20 | 06.09 | 18.35 |
| 1. Febr. | 06.02 | 18.25 | 05.02 | 17.25 | 05.17 | 17.40 | 08.02 | 20.25 | 09.02 | 21.25 | 04.17 | 16.40 | 03.17 | 15.40 | 06.17 | 18.40 | 07.17 | 19.40 | 05.47 | 18.10 | 07.02 | 19.25 |
| 2. Febr. | 06.48 | 19.11 | 05.48 | 18.11 | 06.03 | 18.26 | 08.48 | 21.11 | 09.48 | 22.11 | 05.03 | 17.26 | 04.03 | 16.26 | 07.03 | 19.26 | 08.03 | 20.26 | 06.33 | 18.56 | 07.48 | 20.11 |
| 3. Febr. | 07.35 | 19.56 | 06.35 | 18.56 | 06.50 | 19.11 | 09.35 | 21.56 | 10.35 | 22.56 | 05.50 | 18.11 | 04.50 | 17.11 | 07.50 | 20.11 | 08.50 | 21.11 | 07.20 | 19.41 | 08.35 | 20.56 |